Okkum er sent:

Lívsneyðugt við bergholi millum Sunnba og Lopra

Sóknarfundur í Sunnba viðgjørdi spurningin herfyri

Í sambandi við at eitt yngri ættarlið úr Sunnba, alt sum tað var, nærum ikki bar boð í bý, varð kallað inn til sóknarfund í Sunnba 12. jan. í ár at viðgera samferðsluna til og úr Sunnba.

Á sóknarfundi í Sunnba 12. januar 1984 saman við løgtingsmonnunum í Suðuroy, landsstýrismanninum í vegamálum og Sunnbiar bygdarráð er soljóðandi fundarsamtykt gjørd.

»Undirritaðu íbúgvar í Sunnbiar sókn, Sunnbiar bygdarráð og bý og bygdarráðsformenn í Suðuroy krevja hervið, at projekteringin av bergholinum Sunnba-Lopra og vegirnir í samband við hetta verður byrjað beinanvegin, og at sjálvt arbeiðið verður byrjað í seinasta lagi 1. apríl í ár.

Ongin undanførsla av nøkrum slagi verður góðtikin í sambandi við hetta mál!«

Løgtingsmenninir í Suðuroy Flemming Mikkelsen, Ove Mikkelsen, Hilmar Bech og Atli Dam (sum tók ikki kundi møta av serligum orsøkum) saman við landsstýrismanninum í vegamálum Páll Vang, vóru bodnir til at taka lut í hesum fundi.

Til fundarskrivara varð valdur Hergeir Nielsen og til orðstýrara Johan Hendrik Joensen.

Terje Vestergård legði fyri og bjóðaði øllum at verða vælkomin og gav síðan orðið til Eli Poulsen, bygdarráðsformann.

Hann greiddi frá teimum skrivum, ið sóknarstýrið hevði sent løgtingi og landsstýri viðvíkjandi bergholsgerðini Sunnba-Lopra og vóru hesi dagfest 5. mai 1977, 12. januar 1978 og 11. februar 1982. Í øllum trimum skrivum var víst á, at neyðugt var at fara undir bergholsgerðina við tað fyrsta, um bygdini skuldi verða lív lagað, og sleppast skuldi undan teimum lívshættisligu samferðsluviðurskiftunum í sóknini.

Løgtingsmenninir og landsstýrismaðurin søgud seg allir sinnaðar at fáa málið loyst skjótasts gjørligt, men ymiskt var sum menn mettu útlitini fyri eini loysn.

Flemming Mikkelsen og Páll Vang vístu á, at teir vóru heftir av samgonguni, og at neyðugt var at vera loyalur mótvegis hesi. Tað var ikki hildið skilagott einvíst at trumfa eina loysn ígjøgnum á hesum øki, tá avleiðingarnar m.a. kundu vera, at samgongan reyk. Hinvegin lovaðu báðir, at teir skuldu gera alt tað teir vóru førir fyri innan samgonguna fyri at fáa menn at skilja trupulleikarnar og soleiðis virka fyri, at bergholsgerðin til Sunnbiar kundi fremjast sum skjótast.

Upplýst varð m.a. at bergholið millum Gøtu og Lorvík var komið ígjøgnum í mai mánaða í ár, og at amboðini haðani síðan skuldu flytast eitt nú suður eftir. Sagt varð, at tað var eitt politiskt krav, at amboðini til bergholsgerðir skuldu nýtast, og ikki standa still.

Somuleiðis varð upplýst, at projektið var greitt til at fara undir eftir 14 døgum, um politisk avgerð varð tikin hesum viðvíkjandi. Bergholið verður 2,6-2,8 km langt, og vil saman við vegagerðini til og frá kosta umleið 50 mió. kr.

Ove Mikkelsen og Hilmar Bech greiddu frá m.a., at tað í 1978 eydnaðist, at fáa lógaruppskot um bergholsgerð til Sunnbiar samtykt á tingi, og at lántøka til hesa gerð somuleiðis var lógarheimilað. Teir harmaðust um ta drúgvu gongd málið hevði havt á tingi, og at ongin vissa enn er fingin frá landsstýrinum fyri at bergholsgerðin kann byrja heilt skjótt, nú so drúgv tíð er liðin, síðani løgtingslógin varð samtykt á tingi og bergholslinjan fastløgd. Teir vístu somuleiðis á vandan við samferðsluni í sóknini, og lovaðu báðir framhaldandi at gera tað teir kundu, fyri at málið kundi fáa eina skjóta loysn. Teir søgdu seg, um ikki skjót loysn varð fingin í hesum bergholsmálinum, vera sinnaðar at reisa málið aftur á tingi og hettu í hesum sambandi á samgongu menn um at taka undir við málinum.

Eftir hetta var orðið fritt, so fólk fingu høvi til at siga sína hugsan um hetta álvarsmál.

Beinleiðis spurningur varð settur Flemming Mikkelsen um hann, um neyðugt, vildi sprongja samgonguna, um ikki meiriluti fekst í hesum bergholsmáli. Flemming Mikkelsen svaraði, at tað ikki her og nú var gjørligt at svara hesum spurningi, men mátti hann fyrst hava fund við sínar partamenn á tingi um málið.

Víst var eisini á, at tað var lítið skilagott at byrja við vegagerðini úr Vági, tá tað vildi longja munandi um tíðina, til bergholsgerðin var av.

Sunnbingar vístu eisini á, at komandi bergholsgerð átti at rúma tveimum vegbanum, tá ferðslan annars bleiv munandi tarnað. Páll Vang kundi ikki upplýsa um hesi viðurskifti, tá hann ikki kendi projektið nóg væl, men metti eftir teimum kostnaðarmetanum hann hevði fingið frá Landsverkfrøðingionum, at talan var um berghol við tveimum banum. Víst varð m.a. á, at bygdin var stór, og tí kravdi breiða vegføring, og at sóknin hevði umleið 400 skattgjaldarar, og tí kravdi eina skjóta loysn á hesum máli.

Beinleiðis fyrispurningur bleiv settur fram um, hvussu flutningurin av skúlabørnum ætlaðist at fara fram eftir óhappið. Her vísti Eli Poulsen, buygdarráðsformaður, á, at ætlanin var, at bygdarráðið skuldi samráðast við m.a. samferðslunevndina um hesi viðurskifti, tí ætlanin va rat fara undi rrutukoyring í Suðuroynni. Í hesum sambandi vísti fundarfólk á, at samferðslunevndin kravdi munandi større bussar til flutning eftir Sunnbiarvegnum, og at hetta als ikki kundi góðtakast.

Hergeir Nielsen, limur í samferðslunevndini, vísti á, at tað vóru fleiri, sum høvdu misfatað henda spurning. Samferðslunevndin hevði onga heimild til at krevja større bussar til henda flutning, og hevði honum vitandi heldur ikki gjørt tað, og metti hann tað vera lítið skilagott undir verandi samferðsluviðurskiftum.

Skúlanæmingarnir í Sunnba:

Gerið bergholið áðrenn næsta vanlukkan hendir

Eisini skúlanæmingarnir í Sunnba umframt nógv onnur fólk í oynni hava sent undirskriftir til myndugleikarnar, har ynski um eitt berghol verður sett fram.

Áheitanin er soljóðandi:

Undirritaðu skúlanæmingar, ið dagliga verða fluttir við skúlabussinum í Sunnba til og frá Vágs skúla og sum vóru við í bilóhappinum 6. januar í ár, heita hervið inniliga á tykkum háttvirdu Løgtings- og Landsstýrislimir um at virka fyri, at bergholsgerðin Sunnba—Lopra verður byrjað beinanvegin.

Tað er eingin loyna, at vit hvønn einasta dag stúra fyri hesi koyring, og vóna vit tí, at nakað verður gjørt, áðrenn næsta vanlukka hendir.

Spurningurin um val av bussi var ein samráðingarspurningur millum teir játtandi myndugleikarnar og hann, ið koyra skuldi. Somuleiðis segði Hergeir Nielsen, at nevnda rutukoyring neyvan fór í gongd í bræði, m.a. tí at landsstýrið ikki vildi játta samferðsluskrivstovuni neyðuga hjálp.

Eftir hetta skjeyt Terje Vestergård upp, at flutningur av skúlabørnum eftir Sunnbiarvegnum í verandi líki, ikki skuldi rekast við større bussi enn honum, ið nýttur hevur verið higartil. Hetta varð einmælt samtykt.

Semja var um at senda fundarsamtykt til landsstýrið og løgtingið og til allar, ið mannaðu hesi og skuldi henda fundarsamtykt eisini vera adressa, har øll í sóknini 18 ár og eldri kundu skriva undir saman við bygdarráðnum, løgtingsmonnunum fyri Suðuroy og landsstýrismanninum í vegamálum Páll Vang. Somuleiðis skuldi heitast á allar býg- og bygdarráðsformenn í Suðuroy um at skriva undir adressuna.

Samanumtikið mettu fundarfólkini, fullsett var, at nú var góður møguleiki fyri at fáa hjartamál teirra framt. Samgongu- og andstøðumenn lovaðu sín fulla stuðul, og mettu møguleikarnar fyri eini skjótari loysn heilt góðar. Sunnbingar og suðringar allir bíða nú spentir eftir, at umboðsmenn teirra í landsstýri og á løgtingi loysa hetta mál úr lagdi.